Skósmiðuri

HANDVERK. Mangan fáa bygdafólk skotið í skógvarnar, at tey ikki duga nóg væl at bróta upp úr nýggjum og finna nýggjar vinnuvegir. Men í Skúgvoy hevur hóast tógvið stríð við tað almenna eydnast Manbirni Tórarenni at fóta sær sum ortopediskur skósmiður

Høgni Mohr

»Ortopediskur skósmiður verður á gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri mikudag og á Landssjúkrahúsinum hósdag. Viðtalutíð millum 14 og 17 fæst á telefon 36 14 55. Manbjørn Tórarenni«

Hendan lýsing hevur verið at hoyrt í Útvarpi Føroya annan hvønn mánaða seinastu árini.

Seks ferðir um árið fer Manbjørn Tórarenni við tyrluni úr Skúgvoy til Havnar og Suðuroyar, har hann hittir viðskiftaskara sín; eini 15-20 fólk hvørja ferð. Øll hava tey fótbrek at dragast við. Undir viðtaluni verða brekaðu føturnir máldir út, og síðani leggur ortopediski skósmiðurin aftur leiðina út í Skúgvoynna, har hann býr og framleiðir mongu ymisku skógvarnar.

Flytføri og fríðkan

Aðalendamálið í ortopediska handverkinum er, at skógvurin skal sita sum stoyptur á fótinum og at báðir skógvar skulu líkjast so nógv sum gjørligt. Við øðrum orðum hevur tað týdning, bæði at bøtt verður um flytføri hjá sjúklinginum, men eisini, at skógvarnir kunnu krógva brekið so væl sum gjørligt og fríðka um fótaskapið. Eftir hesum leisti arbeiðir ortopediski skómakarin í húsum sínum úti á Hanskanum í Skúvoy.

Ongin sjómaður

Manbjørn Tórarenni varð borin í heim í Skúgvoy várið 1938. Sekstan ára gamal valdi hann at stíga í fótaspor pápans og fara til sjós. Fyrsti túrurin var við Vágsskipinum, Havgásini.

Men fyrstu myndirnar av havi, ið Manbjørn minnist, eru ógvusligar og ræðandi. Hann minnist, tá ið Tvøroyrarskipið, Falkurin, varð bumbað inni á Sandi, og tá ið Smyril lá og krússaði undan týskum bumbum eysturi undir Fles í 1941. Um tað vóru hesi minni, ið høvdu við sær, at sjólívið ikki gjørdist lívsstarv hansara, vil Manbjørn ikki siga. Men bert 27 ára gamal, valdi hann at leggja seg á land aftur og siga lívinum á opnum havi, farvæl.

– Eg orkaði ikki longur; tað gekk barastani ikki, staðfestir Manbjørn, sum varð verandi í Skúgvoy í ellivu ár, áðrenn hann fór undir at endurútbúgva seg til ortopediskan skósmið í Danmørk í 1976.

Fekk heiðurstekin

Tað tók Manbirni samfull sjey ár at fáa føroysku myndugleikarnar at fáa læruna í lag. Tá ið myndugleikarnir umsíðir játtaðu honum endurútbúgving, fór hann niður á handverkaraskúla í Danmørk, har hann skuldi velja sær handverk. Hann gjørdi stutt av og valdi hitt fyrsta handverkið, hann royndi; ortopediskt skósmíð.

Læruna var hann liðugur við í 1981. Manbjørn er ein av fáu ortopedisku skósmiðunum í danska kongaríkinum, sum hevur fingið heiðurstekin fyri serstakliga væl úr hondum greitt arbeiði.

Heimkomin fór hann undir at byggja fyritøkuna upp. Fyrst í Leirvík, har hann búsetti seg eftir lokna læru.

Stórt arbeiði

Manbjørn er ikki einsamallur framleiðari av ortopediskum skóm. Hann er í harðari kapping við donsku fyritøkuna, Sahva, sum við jøvnum millumbili sendir fólk til Føroya at taka mát av føroyskum fótum. Hesir danskt framleiddu skógvar eru nógv dýrari at framleiða; dupult so dýrir og ruddiliga tað, sigur Manbjørn seg vita.

Men fyri nýtararnar, føroyingar við fótbreki, hevur hetta ongan beinleiðis fíggjarligan týdning. Teir rinda 530 kr fyri parið, meðan Almannastovan rindar meirkostnaðin, soleiðis at fólk við fótbreki ikki skulu verða verri fyri fíggjarliga av brekinum, ið sjálvandi nívir

Ortopediskt skósmíð

Arbeiðshátturin, tá ið Manbjørn ger skógvar, er á leið hesin:

- Umhvarvið av fótinum verður teknað á pappír til tess at fáa hylling á, hvussu fóturin er. Eisini verður fóturin mátaður neyvt upp.
- Pappírið við tekning og málum verður nú nýtt sum grundarlag undir modellinum av fótinum. Modellið verður slípað úr einum ráum træleisti. Tá ið hetta modellið av fótinum er liðugt, verður skógvurin gjørdur rundan um modellið.
- Fyrsta, ið verður gjørt av sjálvum skógvinum, er innleggið, sum er úr korki ella tundri. Innleggið hevur stóran týdning í royndunum at rætta upp skeivar føtur, sum hella antin inn eftir (slættil, á latíni, *valgus*) ella føtur, sum hella úteftir (bekil, á látíni, *varus*).
- Síðani verða pappírsleistir kliptir út. Eftir hesum leistum verða skinnpettini til sjálvan yvirskógvin, klipt. Til ber at velja ímillum nógv ymiskt skinn; t.d. av slangu, fýrbeini!, oksa ella ymiskum flættaðum skinni.
- Tá ið yvirskógvurin er seymaður saman í eitt, verða niðaru kantarnir á honum festir undir innleggið.
- Áðrenn sólin verður settur undir innleggið og skinnfóðurin verður límað inn í skógvin, skal keyparin royna skógvin. Ofta er neyðugt at gera smáar broytingar, áðrenn seinasta hond verður løgd á skógvarnar.
- Skógvamodellið og litin velur keyparin sjálvur eftir úrvalsbók hjá størum skógvaframleiðarum, sum t.d. Ecco.

K@T@-hornið

Nr. 10 · hósdagur 25. mai 2000 · 74. árgangur

Tíðindablaðið Sosialurin, Postboks 76, 110 Tórshavn, Telefon 311820, Telefax 314720 • **T-postur til KT-hornið**: kthornid@sosialurin.fo • **Lýsingar**: lysing@sosialurin.fo • **Ábyrgdarstjóri**: Jan Müller
Blaðstjórn: Steinbjørn í Dali, Finn Jensen • **Layout og uppseting:** Tíðindablaðið Sosialurin • KT-hornið er fastur táttur í Sosialinum hósdag • Evsta mark fyri lýsingar er mánamorgun kl. 10.00.

Bla›stjórn

Steinbjørn í Dali

Finn Jensen

Tele Danmark keypir NetCom

Tele Danmark hevur nú keypt 25.000 eyka partabrøv í norska fartelefon felagnum Netcom, og eigur samanlagt yvir 40 prosent av partabrøvunum. Hetta skuldi veri› ivaleyst til at hava fult tamarhald á felagnum.

Keypi› er ein partur av ætlanini, at ger›ast fremstur á *telekrígnum* í Nor›urlondum á fartelefon markna›inum.

Nor›menn vóru eitt sindur bilsnir, tá teir funnu út av, at ein n‡ggjur leikari var komin á tann á›ur upphita›a fartelefon markna›in í Noregi, sum framvegis ikki er komin heilt fyri seg, aftaná at samanleggingin millum Telenor og svensku Telia fór í hundarnar. Talan var um størstu kappingarneytarnar hjá Tele Danmark.

Vi› keyp av seinasta hálva prosentinum av partabrøvunum, sum ger at Tele Danmark nú eigur 40%, mótvegis 39,5 á›renn, hevur hetta vi› sær sonevnda tilbo››skyldu uppá reystina av partabrøvunum. Hetta hev›i sjálvsagt vi› sær, at lei›slan á stóru fyritøkuni eisini vakna›i vi› timburmonnum hendan lagnu dagin í farnu viku.

Microsoft tekur virus-hóttan í størsta álvara

Kærleiki ger ein blindan, sum tiki› ver›ur til. Og hetta er meira ella minni› ta› sum hevur veri› trupuleikin hjá Microsoft, í samband vi› at allur heimurin hevur fílst á telduskipanina hjá Microsoft, herundir teirra e-post skipan.

Nú tekur Microsoft vi› læru av *I Love You* virussini, og betra um trygdina í Outlook. Aftaná at ***I Love You*** virussin innan 12 tímar, megna›i at ger›a ska›a fyri yvir 10 milliardir dollarar, hava fleiri og fleiri givi› júst Microsoft skuldina av at hetta ber til. Hetta kemst millum anna› av, at eins og vi› *Melissa* virussini, i› gjørdi um seg í fjør›, hevur ta› veri› út frá Microsoft forritum, at byrjunarskotini til heimsumfatandi spja›ingina kom.

Ein av grundunum til at *I Love You* bleiv so *kendur*, er at MS Outlook sendir forrit ví›ari vi› telduposti, uttan at trygdardskipanin er til hindurs fyri hesum.

– *Vit hava gjøgnumgingi› trygdarspurningarnar í samband vi› Outlook, sera gjølla seinastu vikurnar*, sigur Steven Sinofsky, stjóri á Microsoft Associated Press. Tí kemur Microsoft nú vi› eini ókeypis dagføring av Outlook, i› kann heintast á netinum. Men sagt ver›ur at øll hol framvegis ikki eru ste›ga›i.

N‡ggju útgávurnar av Outlook fara ikki longur at loyva egnum forritum at senda teldupost av sær sjálvum. Í sta›in skal ein ávaring gera brúkaran varan yvir vandan vi› sjálvvirkandi telduposti.

Antivirus dagføringin er klár í hesi vikuni, men í fyrstu syftu, bert til Outlook 98 og Office 2000.

Microsoft vísir samstundis á at broytingarnar merkja, at vanlig (sakleys) forrit eisini ver›a ste›ga›i, og at brúkarin má liva vi› fleiri ávaringum og minni brúkaravinarligheit.

Teldútbúgvingar í Føroyum:

Datanomar – eftirútbúgving og faklig menning

Í 1982 fór Føroya Handilsskúli undir datanomútbúgvingina. Í fyrsta umfari vóru ta› fólk í vinnuni, sum tóku hesa útbúgving, men nú eru ta› serliga telduvør›ar á stovnum og fyritøkum. Tørvurin er til sta›ar enn, og tí heldur útbúgvingin fram, sigur Ragnar Magnussen, stjóri á Føroya Handilsskúla

Seinastu tí›ina hava vit skriva› nokkso nógv um n‡ggjar teldútbúgvingar, i› eru settar á stovn í Føroyum, ella sum ætlanin er at seta á stovn. Tí hevur ta› kanska ljó›a›, sum hevur ta› veri› púra øskukalt á útbúgvingarøkinum teldútbúgvingum vi›víkjandi, men so er ikki.

Tí í 1982 tók Føroya Handilsskúli datanomútbúgvingina á skránna, og gongur alt, sum ætla›, so ver›a n‡ggir flokkar tiknir inn í heyst eisini.

Tørvurin var stórur

Tá Handilsskúlin í 1982 fór undir datanomútbúgvingina, var tørvurin á eini slíkari útbúgving rættiliga stórur. Edv-fyritøkan Elektron hev›i brúk fyri at geva fólki bókligan førleika, og handilsskúlin var til dystin fús.

Undirtøkan var gó› og næmingarnir komu í høvu›sheitum frá Elektron, ella frá ø›rum teldufyritøkum í b‡num

Solei›is er kortini ikki longur. Um ta› er tí, at øll starvsfólkini hjá teldufyritøkunum, nú eru útbúgvin, ella um ta› er tí, at teldufyritøkurnar nú seta fólk, sum hava bókliga førleikan upp á pláss, skal ver›a ósagt. Kortini er naka› sum bendir á ta› seinna.

– Nú eru ta› serliga telduvørar á stovnum, sum taka datanomútbúgvingina. So at siga allir stórir stovnar hava telduvørar í dag, og hjá teimum er datanomútbúgvingin sera gó› eftirútbúgving, sigur Ragnar Magnussen, sum leggur afturat, at datanomútbúgving er fyri teldufólk ta› sama, sum merkonom er fyri skrivstovufólk.

Ein blanding av eftirútbúgving og dagføring av teimum seinastu broytingunum, sum ta› eru so ómetaliga nógvar av í telduheiminum.

– Útbúgvingin er altí› dagførd vi› tí seinasta n‡ggja. Tak til dømis java-programmering, sum ikki øll kenna til, sum starvast vi› teldum. Ta› ver›ur dagført alla tí›ina, á øllum økjum, sigur Ragnar.

Vanligt hevur veri›, at bert tveir flokkar hava veri› hvørt ári›, men í ár hevur skúlin roynt seg vi› f‡ra flokkum. Datamatikararnir og datanomarnir hava veri› í flokki saman, og ta› hevur givi› gott úrslit, grei›ir Ragnar frá.

– Datamatikararnir hava ikki so nógvar praktiskar royndir, og tí hevur ta› veri› gagnligt fyri teir, at vera í flokki saman vi› fólki, sum hava praktiskar royndir. Samstundis fáa teir meira at velja í.

Seks modul og ein høvu›suppgáva

Ta› er sum sagt Handilsskúlin, sum samskipar útbúgvingina, sum er sett saman av modulum. Eini 20 ymisk modul eru at velja í, og fyri at kunna kalla seg datanom, skal ein hava tiki› 6 modul, umframt at ein eisini skal hava gjørt eina høvu›suppgávu.

– Næmingarnir velja sjálvir hvørjar lærugreinar tey taka, men vit bjó›a bert tvey skei› út um ári›. Tí er ta› undirtøkan, sum avger, um ta› yvirhøvur ver›ur naka› skei› ella einki, grei›ir Ragnar frá.

Hann sigur, at tá næmingarnir skulu til eina próvtøku í hvørjum moduli, og tann próvtøkan skal klárast vi› einum 6 tali.

– Men ætlar næmingurin at fáa sær endaligt prógv, so skal hann gera eina høvu›suppgávu, sum skal hava eina ávísa stødd. Uppgávan skal sí›ani dømast og verjast vi› enn eina próvtøku. Tá tann royndin er sta›in, kann næmingurin kalla seg datanom.

Útbúgvingin er skipa› solei›is, at at undirvíst ver›ur ein hósdag og ein fríggjadag um mána›in. Undirvíst ver›ur 48 tímar í hvørjari lærugrein, men Ragnar Magnussen, sigur, at størri parturin av arbei›inum er heimaarbei›i.

– Ta› er eingin vón at klára seg vi› bara at ganga í skúla, tí í minsta lagi helvtin av arbei›inum, skulu næmingarnir gera uttanfyri skúlagátt, sigur Ragnar.

Samstarv vi› danir

Hóast datanomútbúgvingin er undir Handilsskúlanum, so er ta› ikki skúlin, sum letur lærarar til útbúgvingina.

Flestu lærararnir koma úr Danmark, og tann best kendi er Allan Dresling, sum starvast vi› lærda háskúlan í Álborg.

– Allan hevur undirvíst her í fleiri ár, men vit hava eisini havt lærarar úr Odense og í fyrstuni brúktu vit lærarar frá edv-skúlanum í Keypmannahavn, grei›ir Ragnar frá.

Annars vísir Ragnar á, at ta› eru møguleikar fyri framhaldslestri hjá teimum, sum gerast datanomar. Lærdi háskúlin í Ålborg hevur gjørt eina útbúgving, sum er skipa› vi› sjálvlestri og vi› undirvísing, og tá hon er li›ug, kunnu tey lesandi kalla seg balchelor í datalogi.

– Men ta› er ikki bara sum at siga ta›, at fara undir, og tey eru heldur ikki so mong, sum higartil hava tiki› hana. Hon er sera tí›arkrevjandi, og krevur sera nógva sjálvdisiplin, tí so stórur partur er sjálvlestur, grei›ir Ragnar frá. Hann leggur afturat, at tríggir føroyingar vór›u lidnir vi› hesa útbúgvingina um ársskifti›, og teir eru teir fyrstu, sum eru farnir undir hana.

Kostna›ur

Ta› er sjálvsagt ikki ókeypis at fara undir eina datanomútbúgving. Hvør lærugreinin kostar gó›ar 2.200 krónur. Tá er kaffi írokna›, tí næmingarnir eru í skúla heilar dagar.

Afturat hesum skal so leggjast kostna›urin fyri tilfari. Lærubøkurnar kosta millum 700 og 1.000 krónur fyri hvørja lærugrein, so tá útbúgvingin er komin til høldar, eru umlei› 20 túsund krónur goldnar. So hugurin skal vera til sta›ar.

Men, sigur Ragnar, ta› eru tey fægstu, sum gjalda ta› sjálvi, tí í mongum førum er ta› arbei›splássi, sum vil hava, at tey taka útbúgvingina og í teimum førum eru ta› eisini tey, sum gjalda fyri útbúgvingina.

Og gongur alt, sum skúlalei›slan vil, so byrjar ein n‡ggjur flokkur av datanomlesandi til heystar. Í løtuni er skúlin vi› at kanna og fyrireika, og tá ta› er li›ugt ver›ur l‡st eftir næmingum.

sveinur@sosialurin.fo